Tíðindabrævið
Hugin & Munin
Granskingarverkætlanin fyri Økismenning
Nr. 1 apríl 2001 2. árg.

# Fjarundirvísing og økismenning

Hugtøk sum útbúgving og eftirútbúgving eru í alsamt størri mun vorðin partur av vesturlendska arbeiðsmarknaðinum og sostatt eisini tí føroyska. Greitt er, at størri og størri krøv verða sett eitt nú almennum stovnum, og framhaldandi útbúgving er tískil eitt krav, skulu hesir stovnar verða førir fyri at veita tað neyðugu tænastuna. Økta kappingin, ið flestu virki kenna, krevur eisini, at tey eru før fyri at laga seg til nýggju krøvini og at fáa burturúr nýggjum møguleikum, og hetta krevur m.a. eina miðvísa førleikamenning av starvsfólkinum.

Sum er, verða flestu útbúgvingar og eftirútbúgvingar bodnar út í Havnini, og hetta setir nakrar náttúrligar avmarkingar fyri einstaklingar, virki og stovnar aðrastaðni í landinum, eitt nú Suðuroy.

Orsaka av farleiðini um Suðuroyarfjørð ber tað sera illa til at fylgja undirvísing í Havnini. Og um ein skal fylgja undirvísingini í Havnini, krevst at fleiri arbeiðsdagar verða lagdir niður hvørja viku, og er hetta sostatt sera dýrt. Nú tykist ein loysn vera funnin.

**Fjarundirvísing í Suðuroynni**

Síðan august mánaða í fjør hava sjey suðringar fylgt HD lesnaðinum á Føroya Handilsskúla í Havnini, men í mun til hinar næmingarnir, sum hava gingið í skúla í Havnini, so hava suðringarnir fylgt undirvísingini um internetið – og er skúlastovan hjá teimum í hølunum hjá Toll & Skatt á Tvøroyri.

Fjarundirvísingin – eisini nevnd videokonferansa – er skipað soleiðis, at tvey kamera (kagar) eru sett upp í stovuni á Føroya Handilsskúla, og verða hesi báðir kagarnir stýrdir úr Suðuroynni, soleiðis at næmingarnar har kunnu snara, zooma o.s.fr. sjálvi.

Myndirnar frá hesum kamera'um verða vístar í einum sjónvarpið, umframt at ljóðið eisini verður sent beinleiðis suður. Við tað at lærarin í Havn sær og hoyrir næmingarnar í Suðuroynni, hava næmingarnir eisini møguleika fyri at seta lærarenum spurningar, júst sum næmingar í skúlastovuni í Havn. Hvat tilfari, sum lærarin býtir út viðvíkur, so verður tað sent til Suðriar við telefaxi og kopierað og býtt út har samstundis sum í Havnini.

Viðvíkjandi munnligu próvtøkuni, sum verður í summar, so verður sama útgerð brúkt. Tað vil siga, at næmingarnar í Suðuroynni eru á Tvøroyri, lærarin í Havnini, og próvdómarin, sum er frá universitetinum í Aalborg, er í Aalborg.

**Næmingar væl nøgdir**

Eftir nakrar heilt smáar byrjunartrupulleikar, har nakrar tillagingar vórðu gjørdar í samráð við næmingarnar í Suðuroynni, hevur skipanin við fjarundirvísing riggað heilt væl. Ongir trupulleikar hava verið við tí tekniska, meðan lærararnir tó hava verið noyddir at vant seg við at gera nýtslu av mikrofon, har áhoyrarin ikki er í sama høli sum lærarin.

Næmingarnir í Suðri eru væl nøgdir, men vísa tó á, at um ein stórskíggji varð brúktur ístaðin fyri eitt vanligt sjónvarp, so hevði tað verið optimalt.




**Toll & Skatt førdi ætlanina út í verki**

Tankin um fjarundirvísing er ikki nýggjur á Føroya Handilsskúli, men tað var ikki fyrr enn í fjør vár / summar, at farið varð undir at gera hendan tanka til veruleika, hetta eftir at Toll & Skattstova Føroya hevði havt ein fyrispurning um undirvísing av hesum slagi.

Toll & Skattstovan hevur eina miðvísa eftirútbúgvingarætlan fyri starvsfólki sínum, men hesi ætlan hevur tað ikki rættliga borið til at fylgt í Suðuroynni. Av somu orsøk var samstarv fingið í lag við Føroya Handilsskúla, har Toll & Skatt keypti útgerðina, ið er sett upp á Føroya Handilsskúla, meðan útgerðin í Suðuroynni verður leigað frá Føroya Tele. Hetta er tilsamans ein íløga uppá umleið 150.000 – 200.000 kr.

**Góðir møguleikar fyri útbygging**

- Í hesi fyrstu royndini við fjarundirvísing hava næmingar bara havt møguleika at fylgja HD lesnaði. Men fjarundirvísingin kann uttan størri hóvasták útbyggjast soleiðis at fleiri útbúgvingar, stakgreinir os.fr. kunnu verða boðin út á hendan hátt, sigur Ragnar Magnussen, stjóri á Føroya Handilsskúla. Spurningurin er bara um at fáa næmingar. Til dømis hevði hetta givið møguleika hjá fólki í Klaksvík, Vágunum ella Suðuroy at tikið ymisk merkonomskeið (framhald á síðu 2)



# Grannastevna

Gunnar K. Nattestad

## 360$^0$

Eitt sera vítt hugtak! At kunna hyggja seg um í allar ættir og hava gott útsýni. Men hettar skal skiljast djúpari enn so, ikki bara fysiskt, men eisini víðari.

Í umrøðuni um útjaðara kontra miðstaðarøki stendur útjaðarin í huganum hjá teimum flestu, sum tann veiki. Tað er so nógv, útjaðarin ikki hevur atgongd til av øllum nýmótans, sum menniskja setur krøv um. Vit kunna nevna ymiskar almennar og privatar tænastur, ið sum oftast bert kunna bjóðast fram, har fólkagrundarlagi er omanfyri so og so nógv túsund. Biograf, bókasavn, konsertir, fyrilestrar, ymiskur ítróttur (serliga innandurða), handlar við servørum og heilsutænastur eru dømi um hettar.

Í dag kenna nógv útjaðaraøki seg (í mun til miðstaðarøkið) sum málmenn, tá ið spælt verður grís. Tá hin parturin fær mál, so er bara at geva teimum bóltin aftur, men tá verjandi parturin vinnur bóltin hevur hann einki mál at skjóta í. Sum heild kunna vit siga, at útjaðarin ikki sær út til at kunna kappast á hesum økjum. Tað verður allarhelst ongantíð ein bowlinghøll í Mykinesi ella kirurgisk deild á Kirkju. Men er so alt tapt fyri tað?

Nei, og langt frá tí! Útjaðarin kann illa kappast á teimum økjum, har fólkagrundarlagið má vera nøkur túsund fyri at vera til, men hesi øki eru ikki allur vøllurin. Hann er nógv størri enn so. Tað eru so nógv onnur øki, har útjaðarin kann gerða seg galdandi og enntá ganga á odda.

Tað er so mangt, ið er høgligar á einum lítlum plássi. Familja, vinir og kenningar, ið øll búgva eitt hanagleiv burtur, og í huganum er tað sum oftast styttri millum húsini á bygd enn í býnum. Ein kann stórt sæð óttaleysur lata børnini fara útum, uttan at hugsa um ferðslu og annan vanda. Spæliplássið, ið ikki er avmarka við hegni og portri, men heldur av sjógvi og fjøllum. Tað er lætt at heita á fólk um at dugna sær eina hond til praktiskt arbeiði ella til at passa tað verið seg børn ella ferføtt. Og so er tað umhvørvið, náttúran, ið sum oftast byrjar, har trappusteinurin endar. Hettar mugu vit eisini taka við, tá ein vil seta búgv.

Í øllum hesum romantikkinum er lætt at gloyma, at tey flestu ikki einans kunnu liva av hesum - heldur ikki á bygd. Tí er neyðugt at hyggja at, hvat vit, ið búgva á smærru plássunum, kunna gera betur. Vit mugu broyta hugburð og ikki læta tað væl kenda klandrið forða okkum í at taka tøk saman.

Alt gott um at tað frá almennari síðu er settur bólkur at arbeiða við útjaðaranum og at roynt verður at spjaða virksemi um landið, men hettar strandar alt, um ikki drívmegin kemur frá okkum sjálvum. Um almennar uppgávur skulu kunna býtast út um landið, so mugu kommunur um landið koma til langtíðarsemjur á økjum, har hesar uppgávur eru. Tað merkir so m.a., at einstaka kommunan má lata frá sær vald til størri lokalar eindir. Vinningurin er, at meiri alment virksemi kemur út um Havnina og harvið verður tænastan betur og lokala ávirkanin sterkari. Økini eru m.a. eldrarøkt, barnaansing, skúlar, heilsuøki, umhvørvið o.s.v. Á umhvørvisøkinum eru krøvini økt nógv seinastu árini. Her og á ymsum øðrum økjum sum barnavernd og heilsu, er upplagt, at kommunur skipa felags nevndir sum eru betur fyri at røkja uppgávurnar og møta framtíðar krøvum.

Ábyrgdin liggur fyrst og fremst á okkum sjálvum. Tað er ov bíligt bert at skylda uppá politikkarar og onnur. Vit eru ávegis inní eina nýggj øld, har m.a. kunningartøknin gevur alt fleiri møguleikar. Men hesir møguleikar hjálpa einki, um ikki onkur brúkar teir. Hin vegin, um vit troyta møguleikarnar, so hendir kanska okkurt positivt.

Tá hettar er gjørt, so má eisini setast krav um, at ytru lokaløkini og íbúgvar teirra fáa somu viðferð sum miðøkið og fólkið har. T.d. við at projekt á bygd fáa somu møguleikar fyri figging sum í býum. Her er eftir øllum at døma nakað eftir á mál, bæði hjá tí privata og tí almenna. Uppgávan er stór, men við málrættaðum samarbeiði á fleiri økjum og millum partar av landinum, kann okkurt gott spyrjast burtur úr. Latið okkum brúka evnini og tilfari Skaparin gav til at menna *alt* okkara land.

---

## Fjarundirvísing og økismenning (framhald frá síðu 1)

Sum er, verður fjarundirvísingin gjørd í samstarv við og í hølunum hjá Toll & Skattstovu Føroya, og hetta setur nakrar avmarkingar, tí hugsast kann, at bara útbúgvingargreinar verða bodnar út, sum starvsfólk hjá Toll & Skatt hava tørv á. Tí hevði tað uttan iva verið ein góð loysn at gjørt ein stovu í Suðuroynni til fjarundirvísing burturav – og hevði tað verið nátúrligt, at ein slík stova var partur av nýggja Miðnámsskúlanum, ið verður bygdur í Suðuroy í næstum, eins og slíkir karmar eiga at verða skaptir aðrastaðni í landinum, har áhugi er fyri tí. Hetta hevði eisini ført við sær, at samstarv viðvíkjandi fjarundirvísing kundi verið fingið í lag við aðrar útbúgvingarstovnar í Føroyum, t.d. Fróðskaparsetur Føroya, og hægri útbúgvingarstovnar uttanlands.

### Fjarundirvísing ein týðandi partur í økismenningini

HD í Suðuroy sær út til at eydnast væl og hetta er ein góður møguleiki hjá teimum lesandi. Hendan ætlan vísir eisini, at stórir møguleikar liggja í fjarundirvísing, ikki minst táð hugsað verður um, at neyðuga útgerðin gerst alsamt bíligari – og kann fjarundirvísing gerast ein sentralur partur av føroysku økismenningini.

## Hvat er HD?

HD er ein breið vinnubúskaparlig útbúgving á akademiskum støði, ið gevur innlit og førleika at nýta samfelagsvísindarligar teoriir og metodur. Útbúgvingin er skipað í tveimum pørtum, har fyrsti partur umfatar undirvísing innan vinnulívsbúskap, vinnurætt, samfelagsbúskap, hagfrøði eins og kunningartøkni. Í seinna partinum skal tann einstaki taka sergrein innan antin roknskap og figgjarstýring ella innan marknaðarføring. Føroya Handilsskúli hevur síðan 1988 bjóðað HD-útbúgvingina út í Føroyum, og verður hetta gjørt í samstarvi við Handilsháskúlan í Århus.

# Eiði í fokus

Hevur Eiðis-bygd nakra framtíð? Hettar var høvuðsspurningurin í einum orðaskifti, sum fór fram fyri skjótt 30 árum síðani í norska tíðarritinum Syn og Segn. Sviin Carl-Gustav Thornstrøm legði fyri við greinini "Eidi og Brox", og spádómur hansara var, at Eiðis-bygd fór ikki at vera lív lagað, hóast nýggja flakavirkið (1966) hevði skapt væl av virksemi.

Vísindaliga var greinin vend ímóti norðmanninum Ottari Brox, og tað var ikki av tilvild, tí alla sína tíð hevur hann verið fremsti talsmaðurin fyri einari bygdamenning, grundað á smávinnu. Seinast í fimmtiárunum legði norska stjórnin fram sokallaðu Nord Norges Planen ella NNP, ið var fakliga grundarlagið undir tí politikki, sum vit – eisini í Føroyum – seta í samband við 'bygdamenning'. Útbygging av samferðslukervinum og stuðul til bygging av kapitalkrevjandi framleiðslueindum, fyrst og fremst flakavirkjum, vóru høvuðspartarnir í NNP-politikkinum.

Ein av teimum, ið ikki var serliga fegin um hesa ætlan, var samfelagsfrøðingurin Ottar Brox, sum í 1966 skrivaði bókina "Hva skjer i Nord-Norge", seinni umsett til føroyskt sum "Hvat hendir á bygd". Ottar Brox vísti á, at tað var ikki nóg mikið við einum útbygdum samferðslukervi, um arbeiði ikki samstundis var at fáa í bygdini. Hann ivaðist stórliga í, um stór flakavirki vóru eydnan fyri Norður-Noreg, tí fyri eina veruliga bygdarmenning er avgerandi, at bygdarfólkið sjálvt eigur framleiðslutóloni og hevur ræði á teimum. Hesi sjónarmið vóru grundarlagið undir teirri sokallaðu populismuni, ið gjørdi seg til talsmann fyri eini varðveitslu av smávinnuni á bygd heldur enn teirri kapitalisering, ið lagt varð upp til við NNP. Eftir Brox'sa hugsan, so hóttu stóru flakavirkini við at syndra norðurnorsku vinnumentanina, ið var grundað á kombineraða smávinnu (sokallaðir 'fiskibøndur', ið grundaðu teirra tilveru á útróður og traðarbrúk).



*Brox vs. Thornstrøm - er Eiðis bygd lív laga?.*

Í 1972 var tann tá 26 ára gamli antropologi-lesandi Carl-Gustav Thornstrøm á Eiði og savnaði tilfar um Eiðisbygd. Burturúr hesi vitjanini kom m.a. greinin í "Syn og Segn". Endamálið við greinini var at vísa á, at sjónarmiðini hjá Brox og populismuni vóru ov bjartskygd. Sambært Brox, sigur Thornstrøm, so er tað tann *politiska* skipanin, sum ger av, hvørt talan verður um miðsavnan ella ikki. Thornstrøm heldur hinvegin, at hesum hevur politiska skipanin ikki ræði á. Kapitalurin vil sær ráða, og tað slepst ikki undan, at kapitalurin fer, har sum profittur er at vinna, og eftirsum herda kappingin krevur størri eindir, so fer kapitalurin at savnast á størru plássunum. Tað er sostatt kapitalisman sum *búskaparlig* skipan, ið elvir til miðsavnan.

Í greinini ásannar Thornstrøm, at nýggja flakavirkið (sum tá hevði verið í gongd í uml. seks ár) er ein glotti, sum hevur steðgað afturgongdini í fólkatalinum, tí tað hevur skapt arbeiði, men hesin glottin er komandi og farandi; fyrr ella seinni fór Eiði at gerast offur fyri teirri óundansleppandi miðsavningini. Meiri sundurgreinað hevur hann tríggjar grundgevingar fyri, hví Eiðis-bygd ikki verður lív lagað:

- Tað vaksandi samskiftið við umheimin hevur við sær, at ungdómurin varnast, at tað finst ein heimur uttan fyri tað darvandi trongskygnið á bygd
- Økta kappingin á fiskivinnuøkinum fer at hava við sær miðsavnan av kapitalinum, og tað fer at hava við sær, at vinningurin av framleiðsluni endar uttanfyri lokalsamfelagið (Eiði), sum eisini missir ræðið á sjálvari framleiðsluni
- Kreppan í fiskivinnuni í Atlantshavi (stríðið um fiskimørk, ovfisking og dálking) fara at hava við sær, at landingarnar á Eiði fara at minka ella detta burtur.

Ottar Brox svaraði aftur og helt, at Eiðis-søgan hjá Thornstrøm júst váttaði, at tað bar til at sleppa undan miðsavnani, sjálvt við flakavirkjum, tí tað var bygdarfólkið sjálvt sum átti virkið. Harfyri var eingin trygd fyri, at Eiði hevði nakra trygd fyri einari framtíð. Tað avgerandi mátti vera at vísa á teir tættir í samfelagsgongdini, sum kunnu ávirkast politiskt, so bygdarsamfelagið framhaldandi kundi eiga og hava ræði á fiskiførum og virkjum. Í aftursvari til hesa viðmerking Brox heldur Thornstrøm fast við, at tann *undirliggjandi* gongdin er miðsavning, og eftirsum at tað er kapitalurin sum fremur hana, so eru einastu ráðini at seta planbúskap í staðin fyri kapitalistiskan profittbúskap.

Hóast Eiði sostatt hevur verið viðgjørd í vísindahøpi, so var tað hugvekjandi at staðfesta, at á Eiði visti eingin um tað! Eiðis kommuna og Granskingardepilin fyri Økismenning skipaðu fyri tiltaki, har teir báðir Brox og Thornstrøm møttust á Eiði 28 ár eftir víggið í Sygn og Segn at tosa um gongdina á Eiði síðani tá og um framtíðina. Granskingardepilin fyri Økismenning gevur út røðina SMÁRIT, og í nr. 6 er greitt frá Eiðis-tiltakinum.

# Fiskivinnan á tímatalvuna

Seinasta heyst bjóðaði Granskingardepilin fyri Økismenning norðmanninum Arne Tunheim til Føroya at greiða frá verkætlanini 'Havet, båten og folket'. Endamálið við verkætlanini er at halda viðlíka og menna fiskivinnumentanina við at geva skúlabørnum høvi til at kunna seg við fiskivinnuna í verki (greitt er frá ætlanini í Hugin & Munin nr. 3). Føroysk skúla- og vinnufólk, herundir fakfelagsfólk, tóku so væl ímóti verkætlanini, at tey beint eftir framløguna settu ein bólk at fyrireika eina líknandi føroyska verkætlan.

Marita Rasmussen frá Vinnuhúsinum er formaður í bólkinum, og hon upplýsir, at tey eru nú komin so mikið áleiðis, at í hvussu er summi føroysk skúlabørn kunnu gleða seg til at fáa ein *live* kunning um fiskivinnuna.

Bólkurin leggur upp til eina trý ára verkætlan, har tveir ella tríggir skúlar, ymiskir í støddd, eru við. Í næstum fer skriv út til skúlarnar, har endamálið og tættirnir í undirvísingini verða løgd fram, og heitt verður so á áhugaðar skúlar um at svara, hvussu teir kundu hugsað sær at loyst uppgávuna í verki (lærarakreftir, vitjanir á virkjum, út at rógva við 'egnum' báti o.s.frv.).



Komandi skúlaár verður hetta ein partur av frálæruni

Í løtuni leggur arbeiðsbólkurin seinastu hond á fíggjarætlanina. Arbeiðsbólkurin hugsar sær, at at fyrsta árið útvega skúlarnir 1/3 av kostnaðinum, meðan verkætlaninin fíggjar hinar báðar triðingarnar. 2. og 3. árið fíggjar verkætlanin ávikavist helvtina og ein triðing. Verkætlanin skal síðani eftirmetast og avgerð takast um, hvørt hetta slagið av praktiskari fiskivinnuundirvísing skal vera fastur táttur í føroyska fólkaskúlanum.

Hendir tað, so hugsar arbeiðsbólkurin sær, at skúlarnir fíggja alt sjálvir, men eins og í verkætlanartíðarskeiðnum er sponsorfígging ein hugsandi møguleiki.

Verður verkætlanin veruleiki, so verða tað 4. og 6. flokkur, ið vera við fyrsta árið, og hini bæði árini kemur 8. flokkur aftrat. Í norsku skipanini eru 10. flokkarnir eisini við, men tað verða teir ikki sambært uppskotinum hjá verkætlanarbólkinum, upplýsir Marita Rasmusen.

Almenna undirvísingini byrjar í 4. flokki; afturfyri verður eingin 'kravd' undirvísing í 10. flokki innan fiskivinnu, men teir næmingarnir, sum hava fingið serligan áhuga, kunnu velja fiskivinnu í 10. flokki eftir galdandi breytaskipan.

# Oljuævintýrið liðugt - hvat so?

Hvat skal Noreg liva av, tá ið oljuævintýrið fær ein enda? Hettar er ein tann mest umrøddi spurningurin í norska samfelagnum í dag. Fyritøkan ECON Senter for Økonomiks Analyse hevur eftir áheitan viðgjørt hendan spurningin, og svarið er, at fiskivinnan í breiðari merking. Talan er um vøkstur og menning innan bæði tradtionell fiskasløg, alivinnu og skeljavinnu; afturat hesum kemur eisini fiskivinnuútgerð og biotøknisk framleiðslu burturúr tí, sum vanliga verður koyrt burtur í dag.

Mesti vøksturin fer at vera innan aling, ikki einans av laksum og sílum, men eisini av toski, kalva og skeljum, men alstórir møguleikar liggja eisini í at gera biotøkniligar úrdráttir burturúr innvølum o.ø. til ídnaðarframleiðslu og til heilivág.

Fortreytin fyri at fáa fult burturúr teimum møguleikum, sum eru í fiskivinnuni, er, at semja um eina langtíðarstrategi um, hvussu menningin skal fremjast í verki. Ein týðandi táttur í slíkari strategi eigur at vera, at stórur dentur verður lagdur á gransking og menning. Í frágreiðingini 'Det Marine Eventyret', ið norska granskingarráðið hevur givið út, grundað á ECON-frágreiðingina, verður sagt, at ein væleydnað menning fer at endurskapa og styrkkja tey alsamt viknandi fiskivinnusamfeløgini framvið norsku strondini.

Útgevari:
**Granskingarverkætlanin fyri Økismenning**
Jústagøta 1
**Postadressa:**
Postboks 159
700 Klaksvík
Tlf. 457744 & Fax 457743
Suðuroy: Tlf. 37 44 77
E-postur: region@region.fo
Heimasíða: www.region.fo
**Ábyrgd:** Dennis Holm og Bjarni Motrensen
**Umbróting:**
Miðil, Klaksvík
**Prent:**
Hestprent